# Íslendingar ímóti ES

Meirilutin av íslendingum eru ímóti, at stjóprnin skal søkja um limaskap í Evropasamveldinum. Í einari nýggjari kanning svara 53,9 prosent av teimum spurdu nei til ES-limaskap, meðan 46,1 prosent siga ja. Verður hugt at, hvat veljararnir hjá flokkunum svara, ao siga 77,5 prosent av veljarunum hjá Samfylkingini siga ja og 22,5 prosent nei. Hjá hinum stjórnarflokkinum, Vinstri Grønir, eru tølini ávikavist 38,2 og 61,8 prosent. Í Framsóknarflokkinum, sum styðjar stjórnina, eru 40 prosent fyri limaskapi og 60 prosent ímóti.



# Órættvíst val

Landspartavalið, sum var í níggju av teimum 89 landspørtunum í Russlandi sunnudagin, endaðu sum væntað við sigri til flokkin Sameint Russland. Flokkurin fekk millum 49 og 70 prosent av atkvøðunum í teimum ymsu landspørtunum, men andstøðan vil vera við, at valið var ikki rættvíst. Serliga kommunistarnir eru misnøgdir. Teir fingu umleið 30 prosent í summum landspørtum, men formaður teirra, Gennadij Zjuganov, heldur, at kommunistaflokkurin fingið minst 60 prosent í hasum landspørtunum, um valið var rættvíst.



# Hátíðarhalda altjóða kvinnudagin

**Sunnudagin frá klokkan 14 – 18 hátíðarheldur Kvinnusamskipan Føroyar altjóða kvinnudagin í Norðurlanda-húsinum – eitt nú við workshop við Lisbeth Nepelong »Frá undirskoti til yvirskot«**

KVINNUDAGUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fá betri ráð - soleiðis!

- Nýtsluveitslan seinastu árini er av, tað er vorðið truplari at læna pengar. Men fyri tað nýtist lívið ikki at verða keðiligt og fátækt. Tá ið kreppan kráar ræður um at finna fram aftur góðar, gamlar, kvinnuligar dygdir: at verða kreativ og at gera tað til eitt spæl at fáa meira fyri minni.

Soleiðis sigur kendi danski serfrøðingurin og ráðgevin innan privatøkonomi, Lisbeth Nebelong, ið luttekur á Altjóða Kvinnudegnum sunnudagin 8. mars 2009, sum Kvinnufelagið í Havn og Kvinnufelagasamskipan Føroya skipa fyri í Norðurlandahúsinum.

Feløgini siga, at av tí at 8. mars er ein sunnudagur í ár, hava tey valt at brúka allan seinnapartin til hátíðarhaldið, heilt frá klokkan 14-18.

Tiltakið verður í stóra salinum í Norðurlandahúsinum.

Í tveir tímar verður fyrilestur og workshop við Lisbeth Nebelong um privatøkonomi undir heitinum »Frá undirskoti til yvirskot«. Um hvussu tú vendir mótráki til viðrák og fært skil á privata búskapinum, hvussu tú sleppur av við pengasorgirnar og sum heild fært betri umstøður at liva soleiðis, sum tú ynskir. Stutt sagt eitt pengaprát við kontantum íblástri og ítøkiligum snildum til eitt lív sum yvirskotsmenniskja.

Annað er eisini á skránni Altjóða Kvinnudagin í Norðurlandahúsinum.

Elin Winther Poulsen, journalistur, fer í dýpdina við einum kvinnuligum stjóra, sum ofta stendur fyri skotum í almenna rúminum, og kvinnukórið Cantabile, undir leiðslu av Unn Patursson, fer at syngja.

Katrin Petersen, journalistur, hugleiðir um íbornu kynsrollurnar, og studentaskúlanæmingar fara at framføra eina variatión yvir sjónleikin Eitt dukkuheim eftir Henrik Ibsen.

Ása og Annika Andreasen, damurnar handan Synergi, fyritøkuni við tí kvinnuliga profilinum, spyrja fjøldina: Er ljósareytt óseriøst?

Sum vant verður Kvinnudagurin eisini karmur um eina framsýning hjá Amnesty International. Í ár um leiklutin hjá kvinnum í stríðnum fyri mannarættindum.

Eisini fer SEV at sýna fram básin, har til ber at kanna orkunýtsluna í húsarhaldinum, og hvussu til ber at spara orku og pening.

Atgongumerki til kvinnudagin fáast til keyps við dyrnar fyri einans 200 krónur.

Við í prísinum er eisini okkurt gott undir tunguna og okkurt gott at leska sær við, siga Kvinnufelagið í Havn og Kvinnufelagasamskipan Føroya.



## FAKTA

Lisbeth Nebelong, sum er rithøvundur, journalistur og Master of Public Management, MPM, leggur júst nú seinastu hondina á sjeyndu bókina um privatøkonomi: "Sund økonomi – sådan!

Hon er serfrøðingur og fastur viðmerkjari í sendingini Go'morgen Danmark hjá sjónvarpsrásini TV2.

Við bókum, greinum, fyrilestrum og á internetinum, gevur hon fólki betri ráð til at liva, soleiðis sum tey ynskja tað.

Lisbeth Nebelong búði í Havn sum ung, og hon skilir føroyskt. Umframt bøkurnar um økonomi, hevur hon skrivað skaldsøgurnar "Når engle spiller Mozart" og "Færøblues".

# Kvinna avlýsir kvinnutiltak

**Orsakað av ov lítlari undirtøku fyri 8. mars ráðstevnuni, sum skuldi vera í Norðurlandahúsinum leygardagin 7. mars, hevur Kvinna gjørt av at avlýsa tiltakið**

KVINNUDAGUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Freistin at keypa atgongumerki til 8. mars ráðstevnuna var í dag. Men tey á Kvinnu kunnu staðfesta, at undirtøka ikki er nóg stór, og tí hava vit valt at avlýsa ráðstevnuna.

- Tað eru stór sannlíkindi fyri, at orsøkin til at undirtøkan er ov lítil, skyldast fíggjarkreppuna, sigur blaðstjórin á Kvinnu, Annleyg Lamhauge.

Tey, sum hava keypt atgongumerki í Telebúðunum, fáa atgongumerkið endurgoldið. Tey atgongumerki, sum eru keypt á kvinna.fo, eru ikki trekt av kontoini, og hesi verða ikki trekt av.

8. mars tiltakið sunnudagin verður sum lýst. Eingin broyting er tó við 8. mars tiltakinum hjá Kvinnufelagnum í Havn og Kvinnufelagasamskipan Føroya, sum verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 8. mars, frá kl. 14:00 – 18:00. Atgongumerkið til hetta tiltakið kostar 200 krónur og kann keypast við dyrnar.



# Kári P. Højgaard í Evropatinginum

**- At kenna støðuna í arktiska økinum hevur stóran týdning, tí tað er har, at fyrstu sjúkuteknini í náttúrini vísa seg, segði Kári P. Højgaard í Evropatinginum í farnu viku**

POLITIKKUR

Í røðu sínari í Evropatinginum í farnu viku, legði Kári P. Højgaard dent á, at heimsins lond í størri mun skulu hyggja at arktiska økinum, tí tað er har, fyrstu sjúkutekini í náttúruni vísa seg. Hann gjørdi eisini vart við, at Føroyar taka avbjóðingarnar í sambandi við veðurlagsbroytingarnar í álvara og hava lagt stóran dent á at granska ávirkananina av tí partinum av verðini, sum Føroyar kenna so væl, nevniliga havinum.

Hann nýtti høvið at greiða Evropatinginum frá, at Fiskirannsóknarstovan, undir leiðslu av Boga Hansen, vinnara av norðurlendsku náttúru- og umhvørvisheiðurslønini, granskar í havinum kring Føroyar. Hann undirstrikaði, at endamálið við hesari gransking er partvíst at økja um okkara vitan um ávirkanina á lívið í havinum og at fáa greiðu á leiklutin hjá havinum í veðurlagsskipanini.

Á fundinum í Evropatinginum luttóku parlamentarikarar og ráðharrar úr bæði Kanada, Ruslandi, Noregi, Týsklandi umframt øll tey norðurlendsku og baltisku londini.

Sum formaður fyri Útnorðurráðnum luttók Kári P. Højgaard eisini í eini røð av fundum í Brússel.